**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI**
**MATR. NR. 864a, 864e, 864f, 864g, 864h og 864c við Dalavegin, Tórshavn**

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, 864a, 864e, 864f, 864g, 864h og 864c við Dalavegin, Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bústaðarbygging á økinum.

Stk. 2. Útstykkingin er uml. 6900 $m^2$ til støddar og liggur í einum A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Útstykkingin hevur 12 grundøkir til sethús og tvíhús, 1 grundøki við ástandandi sethúsum, fríøki, felags parkeringspláss og felags reinsiverk.

Stk. 4. Grundøkini eru uml. 400-700 $m^2$ til støddar.

Stk. 5. Vegir, felagsøkir og gøtur skulu gerast sum sýnt er á kortskjali 2.

Stk. 6. Stórigarður er í økinum og skal hesin varðveitast. Um grivið verður á grundøkjunum, sum deila mark við Stóragarð, skal hetta gerast í samráð við kommununa.

Stk. 7. Sambært kap. IV, §5, stk.2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu skulu grundøkini í A1-økjum vera í minsta lagi 500 $m^2$. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av minstuvíddini kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.

Stk. 8. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regulerаði í hesi serstøku byggisamtykt eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið, sum byggisamtyktin regulerar skal nýtast til stakhús og tvíhús.

Stk. 2 . Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið eru flokkað í umhvørvisflokki 1 í umhvørvisflokking fyri vinnustykkir í Tórshavnar kommunu.

Stk. 3. Hetta virksemið skal avmarkast soleiðis, at tað ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur.

## §4. VEGIR

Stk. 1. Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## §5. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Byggistigið má í mesta lagi verða 0,3.

Stk. 2. Nýtslustigið fyri stakhús má í mesta lagi verða 0,6 og 0,7 fyri tvíhús.

Stk. 3. Útrokning av nýtslustigið er samsvarandi kap. IV, §27 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 4. Mest loyvda hædd av húsum er 9,0 m frá planering.

Stk. 5. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu verða í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

## §6. BYGGING IÐ ER

Stk.1. Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

Stk. 2. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um, ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI.

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
| --- | --- |
| Mál nr.: | 18/01015 |
| Ætlanarskriv: | 12/2-2019 |
| Góðkent: | 14/2-2019 |
| Váttað: | |




| **Tórshavnar Kommuna**<br>**Býarskipanardeildin** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 864a, 864e, 864f, 864g, 864h og 864c við Dalavegin | | | | |
| **Undirheiti** | Yvirlitskort | | | | |
| **Kort** | 1 | | | | |
| **Dagur** | 12.02.19 | **Mát** | 1:2000 | **Tekna** | RVH |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna** Býarskipanardeildin | | | | | |
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 864a, 864e, 864f, 864g, 864h og 864c við Dalavegin | | | | |
| **Undirheiti** | Skipan av øki | | | | |
| Kort | 2 | | | | |
| **Dagur** | 12.02.19 | **Mát** | 1:500 | **Tekna** | RVH |

HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

14. februar 2019
**Mál**: 18/01015-10
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

***Góðkenningarskriv***

**Serstøk byggisamtykt fyri eitt øki við Dalavegin í Havn**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tórshavnar kommuna við skrivi, dagfest 17. desember 2017, sent Heilsu- og innlendismáláráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 64a, 864e, 864f, 864g, 864h og 864c við Dalavegin í Havn til góðkenningar.

Ætlanin við serstøku byggisamtyktini er at skipa økið við 12 grundstykkjum til stak- og tvíhús, sum verða millum 400 og 700 m2 til støddar og eitt fríøki á 700 m2. Økið er í umráðisparti A1, har grundstykkini skulu verða í minsta lagi 500 m2, men sambært serstakari byggisamtykt kunnu grundstykki verða 400 m2 fyri stakhús og 300 m2 fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum.

Broytingin hevur ligið alment frammi í tveimum umførum. Fyrru ferð frá 30. apríl til 11. juni 2018 og seinnu ferð frá 8. oktober til 19. november 2018. Hetta tí at tilfarið, sum lá frammi til fyrru hoyring, ikki var fullfíggjað o.a.

Kommunan hevur móttikið eitt mótmæli frá grannum, sum m.a. mótmæla at kommunan loyvir grundstykki, sum eru minni enn 500 m2, tí at tey meta, at tað fer at geva tættari bygging, og harvið verða til ampa fyri útsýnið, m.a. tí at minni grundstykki fáa fólk at byggja hægri. Eisini skjóta tey upp, at byggjast bara kann í 1,5 hædd og at krav skal vera um flagtekju.

Tórshavnar kommuna hevur ikki tikið mótmælið ella broytingaruppskotið til eftirtektar. M.a. við hesi grundgeving:

- Serstøk byggisamtykt, ið loyvir grundstykki upp á 400 m2 er heimilað í galdandi byggisamtykt
- Flestu grundstykkini í økinum eru uml. 400 m2,
- Royndir vísa, at fólk vanliga byggja so nógv sum tey kunnu, líkamikið um grundstykkini eru 400 ella 500 m2.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

Til uppskotið um avmarkaða hædd og krav um flagtekju vísir kommunan á, at ásetingin um hædd er sambært galdandi byggisamtykt, og at grundstykkini í grannalagnum í stóran mun eru uml. 400 m2 og at tað tí ikki fer at broyta dámin á økinum.

Sama mótmæli frá grannunum er eisini sent Heilsu- og innlendismálaráðnum umvegis Kærustovnin 21. november 2018. Ráðið hevur, umframt alt tilfarið frá kommununi við mótmælinum, eisini sent hetta mótmælið til ummælis hjá Býarskipanarnevndini.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini og grundgevingunum frá kommununi um ikki at ganga mótmælinum ella broytingaruppskotinum frá grannunum á møti.

Sagt verður frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina við Dalavegin, sum omanfyri nevnt.

Mint verður á, at hóast Heilsu- og innlendismálaráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega møguliga aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt rættað byggisamtyktartekstur við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri